## DAGSINS MEINING

# Skálafjarðasiglingin – ein dýr tænasta

Nú er greitt, at tað fer at kosta í minsta lagi slakar 8 mió.kr. at hava eina siglingarleið inn á Skálafjørðin. Hetta fekk almenningurin at vita mánadagi, tá tilboðini upp á ta fyrstu privatu rutunu hjá Strandfaraskipum Landsins vóru latin upp.

Tað hevur verið ein kongstanki hjá hesum landsstýrinum, at nakrar almennar tænastur skulu privatiserast ella útlisiterast. Óóivað er tað rætt at leggja summar tænastur út til privatar persónar ella fyritøkur at reka, men í øðrum førum er tað púra burturvið. Serliga tá tað snýr seg um lívsneyðugar samfelagstænastur.

At leggja skálafjarðasiglingina út til eina privata fyritøku at reka kann neyvan øsa nakran. Siglingarleiðin er ikki nøkur lívsneyðug tænasta – heldur ein marglætisruta – og kann eitt privat felag reka hana bíligari enn Strandferðslan, er tað ein sjálvfylgja at "pirvatisera" leiðina.

Men kostnaðurin hjá tí privata flutningsfelagnum, sum hevur tað bíligara tilboðið, er tvífalt so høgur, sum tað ídag kostar at sigla millum Havnina og Skálafjørðin hjá Strandferðsluni. Stikk den! Men vit skulu sjálvandi hava í huga, at Strandferðslan brúkar eina 40 ára gamla dangu, meðan eitt privat felag skal gera íløgu í eina rættliga nýggja tvíkilju.

Nú vita vit so, at tað fer at kosta 8 ella 10 mió.kr. at hava hesa siglingarleið. Um hetta er lítið ella nógv skal vera ósagt á hesum stað. Men vit kunnu seta spurnartekin við nyttuvirðið í hesi leið, og mæla Vinumálastýrinum til at koma við eini cost-benefit-kanning.

Eisini kunnu vit samanbera henda kostnaðin við, at ein túrur afturat millum Suðuroynna og meginøkið vanliga verður sagdur at kosta eina mió.kr. Nógv orðaskifti hevur verið um túratalið á hesi siglingingarleið, sum er tað einasta sambandið, suðuroyingar hava, meðan fólk við Skálafjørðin, ella eysturoyingar sum heild, kunnu seta seg í ein fjálgan bil ella buss, og koyra eftir góðum vegi, um berghol og brúgv, tá leiðin gongur til Havnar.

Tað kann ikki verða annað enn torført at koma við eini politiskari grundgeving fyri at varðveita hesa leið, tá tað nú er greitt, at hon fer at kosta tað sama sum 10 túrar millum Suðuroynna og meginøkið. Serliga tá vit hava í huga, hvussu torført tað hevur verið at hækka túratalið á hesi leið, sum er ein lívsneyðug tænasta fyri fólkið, vinnulívið og trivnaðin í Suðuroynni. Løgtingið hevur nú møguleikan at spara 10 mió.kr., og hann má vera kærkomin, tá vit dagliga hoyra um tørvin á øllum økjum!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fuppliberalistar

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Brúkarin og skattgjaldarin eru statistar í einum fantastiskum tele-sjónleiki, har 5 meir ella minni almennir stovnar spæla liberalismu, ella hava eftirlit við spælinum. Handritið skrivar Vinnumálastýrið...

Skattgjaldarin og brúkarin hava eitt strævið lív. Einaferð áttu teir ein almennan stovn, Telefonverkið, ið teir rindaði fyri við tænastugjøldum og yvir skattin. Tað var meðan Vinnumálastýrið enn var ein viðfáningur. Liberali tíðarandin og einsporað hægri útbúgving førdi við sær, at vit fingu eina ørgrynnu av ungfólki av lærdum háskúlum, ið bert síggja samfelagið sum eina forrætning. Hesi, ið óivað øll lesa í somu lærubókum og við somu brillum, eru farin í holt við at fyrireika liberalisering og privatisering av almennum tænastustovnum. Tey eru so heppin, at í landsins stýri ræður nýliberalismunar borgarligi andi, so nú gongur alt upp í eina hægri eind.

**Telefonverkið lá fyrst fyri**
Telefonverkið var tann fyrsti stovnurin, ið skuldi umskipast til alment partafelag og síðan privatiserast. Kapping og útlendskur kapitalur var loysunarorðið, og brúkarin bleiv útnevndur til vinnara.

Lítil og ongin útlendskur kapitalur og kapping kom kortini. Fyrst kom ein pinkulingur, TeleF, á vøllin og síðan enn ein aftrat, Kall nevndur. Partaeigari í Kall er Framtaksgrunnurin, har skattgjaldarin eigur hvørt oyra. TeleF og Kall megnaðu ikki kappingina, og eru nú lagdir saman. Í tí samanlagda felagnum verður Framtaksgrunnurin óivað størsti partaeigarin. Tvs, hvør er so tann vágafúsi? Tað er aftur skattgjaldarin.

Fyri at gera tað heila meiri tragikomiskt, so hava vit tveir aðrar almennar stovnar, Fjarskiftiseftirlitið og Kappingarráðið, ið m.a. hevur eftirlit við um kappingin virkar. Harumframt finst eisini ein kærunevnd.

**Skattgjaldarin fíggjar liberalistiska sjónleikin**
Brúkarin og skattgjaldarin eru statistar í hesum fantastiska sjónleiki, har 5 meir ella minni almennir stovnar spæla liberalismu, ella hava eftirlit við spælinum. Handritið til leikin verður dagført eftir tørvi. Høvuðsleikarin Telefonverkið, ið saman við Vinnumálastyrinum upprunaliga skrivaðu leikin, vaks seg stórt og sterkt, áðrenn hinir komu á vøllin. Tá hesir smáðu so komu á vøllin høvdu teir ongan kjans. Men fyri at halda leikinum koyrandi, er skattgjaldarin nú aftur komin á vøllin við pengum og kappingarneytarnir vena seg uppá skift.

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum, sigst varða av øllum hesum stóvnum, óansað hvørjum hann, ið kappingana heilaga navni, keypir frá. Hansara egnu eftirlitsstovnar siga, at ávísir almennir pengar eru meiri kappingarskapandi enn aðrir, alt meðan hann kappast við seg sjálvan. Sum nakað nýtt mátti landsstýrismaðurin velja kærunevnd, tí ein kappingarneyti hevur kært eina avgerð hjá eftirlitsstovni.

**Fjølmiðlarnir eru kvirrir – eftir stendur brúkarin**
Fjøðlmiðlarnir eru kvirrir og glaðir, tí teir fáa eina ørgrynnu av inntøkum av lýsingum, ið eru við til at halda sjónleikinum koyrandi.

Eftir stendur skattgjaldurin og brúkarin, ið skal eitast at hava gjørt kvetti við bíligum og góðum tænastum. Eg meini tað.

Samgongan syngur sítt seinasta ørindi og skjótt verður møguleiki hjá veljaranum at geva hesum fuppliberalistum durafjóringin. Javnaðarflokkurin ætlar sær í øllum førum at taka skortarnar av samgonguni og leiktjøldini niður, fyrst á fólkatingsvalinum og síðan á løgtingsvalinum.

# Fólkatingsarbeiði

**Jákup Fróði Djurhuus**



**- Er eitt fulltíðarstarv**
Ein fólkatingslimur skal ikki vera í løgtinginum. Og ein Løgtingsmaður skal ikki hava sæti í fólkatinginum.

Tann sum í hesum miðlatíðum pástendur, at tað er ein fyrimunur at vera í báðum støðum, ger tað bara við peningaligum vinningi fyri eyga.

Nú skulu 2 umboð veljast á fólkating. Nógvir samanbrestir, og ikki færri misskiljingar hava verið seinnu árini ímillum londini bæði.

Orsøkin er einføld. Partarnir kenna ikki hvønnannan longur , soleiðis sum man gjørdi tað fyri einum 20 árum síðani.

**Flúgva niður ídag - heimaftur ímorgin**
Teir báðir, sum hava verið valdir í fólkatingið, hava røkt hetta starvið sum eitt vinstrahondsarbeiði. Teir hava stutt sagt bara trekt løn. Flogið til Danmarkar ídag - heimaftur ímorgin.

Vit sum skulu velja 2 umboð á fólkating, skulu ti seta fram eitt høvðuskrav.

Vit eiga at tryggja okkum, at tann persónur vit velja, lovar høgt og heilagt, at viðkomandi skal røkja starvið sum eitt fulltíðarstarv.

Tí tað gera allir aðrir fólakatingslimir. Og lønin er himmalhøg.

Tann valdi persónurin skal brúka alla sína orku til at virka ímillum danskar fólkatingslimir, og donsku umsitingina.

Hann skal vera í Danmark, og ikki ganga her heima og mæla.

Hann skal lova okkum, at fáa upprætta góðu viðurskiftini aftur, við at gera eitt megnararbeiði.

Tað krevur nógva arbeiðsorku - tað krevur nógva tíð. Og tað hevur mangla seinastu nógvu árini. Tí er skilið sum tað er.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Off Side

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Dimmalætting hevði í gjár nakrar viðmerkingar til ósemjurnar í uttanlandsnevndini.

Spurningurin varð reistur, um talan mundi vera um valdsmisnýtslu. Eisini var stjórin hjá løgtinginum endurgivin fyri at siga, at kanningin av málinum var røtt.

Í veruleikanum snýr málið seg um demokratisku spælireglurnar. Á sama hátt sum í fótbólti eru eisini í løgtinginum nakrar reglur, sum spælararnir mugu halda.

Ein av spælarunum er løgmaður. Hann hevur samskiftið við útheimin um hendi, men hann skal søkja sær ráð og góðkenning hjá uttanlandsnevndini. Løgmaður arbeiddi nakað seint í málinum um flogloyvini. Men løgmaður hevur ásannað, at leikluturin hjá honum kann røkjast betri eina aðru ferð, millum annað við at lættari verður at fáa fatur á løgmanni. Harumframt mugu limirnir í uttanlandsnevndini kunnast betri. Men samanumtikið, løgmaður ynskir fair play.

Ein annar spælari er formaðurin í uttanlandsnevndini. Hann roynir at takla harðliga og fara í álop um ríkisrættarligu støðuna, heldur enn at spæla saman og avgreiða málið um flogloyvini. Men so verður hann fangaður í eini off side-fellu. Reglurnar siga tað, at eru ikki allir limirnir nøgdir við hansara kunning í málinum, ja so kann fundur ikki vera fyrr enn 18 tímar eftir fundarboðini. Ein taktiskur brølari kostaði Hergeiri dýrt.

Tað ber ikki til at standa og gálva og rópa, at tað er órímiligt at brúka off side-fellur. Reglur eru reglur. Hergeir royndi at loypa á og var fangaður. Tað ber heldur ikki til í eini kanning at "staðfesta" at limirnir í uttanlandsnevndini vóru nóg væl kunnaðir. Eru limirnir ikki nøgdir sjálvir, so "staðfesta" teir, at ein skjót viðgerð er off side.

Tað, sum í veruleikanum er løgið, og sum formansskapurin vónandi fer at taka upp, er leikluturin hjá linjuverjunum, løgtingskrivstovuni. Skrivstovan skal ikki meta, um tað er meira ella minni skilagott at fara í álop ella brúka off side-fellur. Skrivstovan skal halda reglurnar og veittra við flagginum, tá okkurt er galið — sambært reglunum.

Í hesum málinum hevur tað borið til hjá einum limi í nevndini at fáa eina frágreiðing um ein annan lim í nevndini. Serliga tykist (sambært fjølmiðlunum) vera gjørd kanning, ið "staðfestir" at ein tinglimur skuldi verið nøgdur við tað, sum hann fekk at vita. Hetta ber ikki til. Skrivstovan má syrgja fyri, at reglurnar verða hildnar. Tað vil siga, at allir limir verða kunnaðir um alt málið og øll skjøl so skjótt til ber. Og verða limirnir ikki samdir um nakað annað, so skal fundur haldast — ikki fyrr enn 18 tímar eftir, at tann seinasti limurin fekk boðini.

Skal nøkur "staðfesting" vera av viðurskiftum, ið viðkoma einstøku limunum, so mugu teir hvør í sínum lagi sleppa at gera viðmerkingar til slíkar "staðfestingar". Undir øllum umstøðum mugu reglurnar fyri kanningar og "staðfestingar" vera tær somu fyri allar tingmenn, og hesar mugu sendast nevndarlimunum, áðrenn tær vera at síggja á internetinum ella í bløðunum.

# Fíggjarlógin aftur dundrandi hall

## Óforsvarliga framferðin hjá samgonguni má steðgast

**Edmund Joensen**



**Er ein nýggj samfelagskreppa á veg?**
Positiva fíggjarliga gongdin í Føroyum, sum bleiv skapt undir seinasta Sambandslandsstýri er vend til óhugnaliga afturgongd. Hetta hendir í bestu innløgutíð, landið nakrantíð hevur havt.

Hetta hendir hóast núverandi samgonga hevur niðurbundið flestu økir í okkara vælferðarsamfelag.

Ein høvuðsorsøkin til "dundrandi hallið" komandi ár eru óforsvarligar yvirtøkur fyri umleið 400 milj. kr. Men hetta er so sanniliga ikki einasta orsøkin.

Ein ótálmað hækking av rakstrinum av samfelagnum, og ikki íløgur við framtíðarvirðum, uppá eina slaka milliard kr. í hesum samgonguskeiðinum er ein onnur orsøk. Tá eru eykajáttanir ikki taldar við.

Bara almenna høvuðsumsitingin er í hesum stutta tíðarskeiði dýrkað úr 52 milj uppí 105 milj. kr. fyri at nevna eitt dømi. Hetta hendir undir fólkafloksleiðslu.

Tað er torført at hugsa sær, at hesin óforsvarligi politikkur ikki ber í sær eina nýggja samfelagskreppu í Føroyum.

**Fólkatings valið**
Fólkatingsvalið kom í tøkum tíma. Spurningurin er um vit fáa steðga ørskapinum. Kann veljarin brúka fólktingsvalið til at geva fullveldismonnum eitt so týðuligt varskó, at hesir steðga nøkrum av teimum yvirtøkum, teir hava ætlanir um?

Søgan hevur tað við at endurtaka seg. Seinnu helvt af áttatiárunum skuldarbunduð fullveldismenn Føroyar so nógv at samfelagið fór av knóranum. Hesa fer eru fullveldismenn í ferð við at minka um føroysku fruminntøkurnar við einari helvt. Hetta kann fáa eitt og hvørt samfelag av knóranum.

Leitað vit eini 50 ár aftur søguna, síggja vit eina sorgarsøgu av líknandi slagi, har oyðsl og skeivar íløgur hoyrdu til dagsins ordan. Tá fingu Føroyar eisini bankakreppu og vóru val á veg á húsagang.

Fyri fáum árum síðan fluttu meira enn 7.000 føroyingar í onnur lond fyri at lívbjarga sær og sínum.

25 % av føroyingum vóru arbeiðsleysir. Tey sum høvdu arbeiði vistu hvørki út ella inn, orsakað av vaksandi skatti og avgjøldum.

Sambandslandsstýrði frá 94 til 98 stóð á ádda fyri at reisa føroyska samfelagi aftur úr øskuni. Hetta hevði ikki lætið seg gjørt uttan ríkisfelagsskapin. Hetta hevði heldur ikki verið gjørligt um fullveldismenn longu tá høvdu slept helvtini av føroysku fruminntøkunum.

Føroya fólk kann ikki longu hava gloymt, at tað vóru fullveldisflokkarnir sum stóðu fyri teimum óforsvarligu tiltøkunum, sum førdu føroyska samfelagið út í húsagangin.

Skuldi onkur havt gloymt hetta, so eigur eitt dundrandi hall á fíggjarlógini aftaná bestu ínniløguárini í føroya søgu nakrantíð at fáa ávaringarklokkurnar at ringja.

Fullveldisflokkarnir eiga ikki at sleppa at koyra føroyska samfelagið á húsagang eina ferð enn. Teir mugu steðgast.

# Skyldur og rættur

**Zakarias Wang**



Sagt verður: Ger tína skyldu og krev tín rætt!

Nú skulu vit fara á val, og vit vita við okkum sjálvum, at vit gera okkara skyldu. Vit strevast á sjógvi og landi, líka frá Svaldbarðs strondum til tær húsmøður heima sum ala upp okkara komandi ættarlið.

Men samstundis vita vit, at vit ikki fáa tað burturúr, sum vit áttu at fingið. Túsundavís av føroyingum hava verið noyddir at fara heimanífrá og liva í útisetu millum fremmand fólk og síggja børn síni vaksa upp og tosa eitt fremmant mál. So gott sum hvørt føroyskt húski hevur verið fyri tí vanlagnu at mist onkran av sínum kæru á slíkan hátt.

Orsøkin til hetta er, at vit ikki fáa okkara rætt!

Tann 14. september 1946 samtyktu vit, at vit skuldu gerast eitt sjálvstøðugt land. Hetta sluppu vit ikki, tí danir fingu lokkað nakrar av okkara politikarum til at taka við einum árligum studningi í staðin fyri. Síðani hava danir og hesir politikarar stýrt okkum og hava tí ábyrgdina av tí vanstýri, vit hava livað undir síðani.

Tað vit hava rætt til, er eitt endurgjald fyri allan tann skaða, sum danir og teirra húskallar her hava gjørt okkum, síðan teir suspenderaðu demokratiið og róku løgtingið til hús í 1946.

Landsstýrið hevur bjóðað dønum nakað, sum er nógv minni, nevnliga ta íslendsku loysnina frá 1918, so vit fáa eitt útgjald her og nú sum er so stórt, at renturnar av tí svara til tað sum vit í løtuni fáa sum ríkisveiting.

Tíverri fyri danir tóku teir ikki við hesum tilboði okkara, og tí er tað burturdottið. Men lætt er at síggja, at sjálvt henda loysn hevði givið okkum ráð til í ein ávísan mun at byggja upp okkara samfelag, so at vit ikki framvegis høvdu verið eftirbátur.

Hetta hevði t.d. havt tann týdning fyri samferðslukervið, at vit kundu fingið eitt veganet, sum hevði verið so útbygt, at tað hevði borið til at komið frá Sumba til Viðareiðis eftir góðum tveimum tímum uttan at bummpengar vórðu kravdir upp. Tá hevði eisini borið til at fingið eitt sjúkrahúsverk, har okkara sjúku fingu sømilig kor.

Hetta er nakað av tí, tjóðveldisflokkurin vil. Vit vilja nevnliga hava eitt samfelag, har tað ikki eru tey fáu, sum fara avstað við øllum eyði samfelagsins.

Vit vita fullvæl, at vit saktans kunnu fáa eitt gott og solidariskt samfelag við vælferð fyri øll uttan at vit fáa so mikið sum eitt klovið oyra frá dønum. Men danir skulu ikki halda, at klaverið spælir soleiðis, at teir í meir enn hálva øld kunnu hóreiggja sær sum harratjóðin yvir okkum við at tveita nøkrum av landsmonnum okkara nakrar válgarabitar og so halda, at teir sjálvir kunnu sleppa snikkaleysir frá at reka túsundavís av landmonnum okkara burtur frá heimlandi og øllum sínum kæru.

Setningurin hjá einum føroyskum fólkatingsumboði er at geva dønum ráð um, hvussu teir skulu stýra landi sínum.

Fremsta ráðið, ið føroysk fólkatingsumboð eiga at geva, er at danska stjórnin skal taka upp ein nýggjan føroyapolitikk. Tann politikkur, danska stjórnin rekur nú, er ikki ber skaðiligur fyri Føroyar og føroyingar, og eisini til skomm og skaða fyri ta donsku tjóðina.

Umráðandi er, at danskir politikarar taka sær betri partar fyri, og tað mugu okkara umboð gera alt fyri at fáa teir til.

Eitt stig á hesi røttu leið er longu tikið. Unga Tjóðveldið fekk øll ungmannafeløgini hjá politisku flokkunum í Norðurlondum at taka undir við, at føroyingar skuldu sleppa at nýta sín demokratiska sjálvsavgerðarrætt. Taka fólkatingsumboðini hesi ungu sum fyrimynd í politikki sínum, so er sanniliga vón um bata fyri land og tjóð.